Stórir bygningar á Ei›i

Ítróttarhøllin á Ei›i ver›ur nú reist

Mynd: Edvard Joensen

Mánadagin byrja›u menn at reisa Ítróttarhøllin á Ei›i, samstundis sum fari› er undir at stoypa grundina til landingarmi›stø›ina

KOMMUNUTÍ‹INDI
Edvard Joensen

Ei›i: Ítróttarhøllin á Ei›i ver›ur nú reist. Men hon er ikki einasti bygningur, kommunan letur gera í hesum døgum. Eisini ver›ur landingarmi›stø› bygd á Ei›i.

Ei›is Kommuna hevur stórarbei›i í gongd í løtuni. Fast í skúlan vestur eftir ver›ur bygdur ein stórur bygningur, sum fer at rúma bæ›i skúla og ítróttarhøll.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sforma›ur á Ei›i, sigur, at ætlanin nú er at fáa høllina inniloka›a sum skjótast, á›renn veturin rættiliga kemur. Arbei›i› er eitt sindur seinka› í mun til upprunaligu tí›arætlanina, men so er bara at bera so miki› skjótari at, heldur hann.

Ta› fyrsta, sum gjørt ver›ur li›ugt í n‡ggja bygninginum, ver›a skúlastovurnar. Talan er um serstovur so sum tónleikastova, smí›stova, bókasavn og anna›. Tørvur er á serstovum, hóast nakrar eru í verandi skúla. Tær stovurnar, sum eru í gamla skúlanum, ver›a so tiknar til vanligar skúlastovur, og virksemi› flutt í n‡ggja bygningin, har so fleiri serstovur koma aftrat.

Upprunaliga var ætlanin, at n‡ggju stovurnar skuldu takast í n‡tslu, tá skúlaári› bygja›i aftur eftir summarfrítí›ina komandi, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sforma›ur. Men líkt er í løtuni til, at ta› kanska ikki ver›ur fyrr enn um ársskifti› 2001-2002.

Sjálv ítróttarhøllin ver›ur so gjørd li›ug og tikin í n‡tslu, tá skúlaparturin er li›ugur. Í vestara enda á bygninginum ver›a teir fasilitetir, sum hoyra slíkari høll til, so sum brúsurúm og tilíkt. Eisini ver›ur eitt líti› loft gjørt inni í tí partinum, sum hoyrir høllini til. Hetta fer at ver›a brúkt í sambandi vi› skúlan, sigur bygdarrá›sforma›urin.

Men ta› er avmarka›, hvat gerast kann í ár, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi. Ikki tí at Ei›is Kommuna ikki orkar fíggjarliga, tí pengar eru til. Men hon sleppur ikki at brúka teir. Loyvt er bara at brúka hálvatri›ju millión krónur til íløgur, hóast brúk er fyri meira.

Hann f‡list á, at politikkarar gera n‡ggjar lógir, í hesum føri skúlalóg, sum krevur eina rúgvu av skúlunum, men somu politikkarar syrgja samstundis fyri, at komunurnar, sum fíggjarliga orka, ikki sleppa at gera ta›, sum teir vi› lóg hava kravt skal gerast.

Samla›i kostna›urin fyri skúla og ítróttarhøll á Ei›i fer at liggja um 11-12 milliónir, metir bygdarrá›sforma›urin. Ei›is Kommuna stendur einsamøll vi› hesi útrei›sluni. Studningur er eingin at fáa, men ta› skal Ei›is Kommuna nokk klára at gjalda sjálv, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sfoma›ur á Ei›i avgjørdur.

Eisini anna› byggivirksemi er á Ei›i í løtuni. Á havnarlagnum ver›ur stoypt grund til at seta eina landingarmi›stø› á.

Naka› er sí›an, fari› var› undir verkætlanina. Fylt er út á sjógv, har mi›stø›in skal standa, og kloakkarbei›i og tilíkt er gjørt.

Sjálv stø›in skal ætlandi standa klár at taka í móti fiski, tá várró›urin byrjar aftur. Tá plagar at vera rættiliga lívligt í havnini á Ei›i.

Undanfarin ár er fiskurin, sum lagdur er upp á Ei›i, koyrdur út á Toftir at selja, og so er ta› meira enn so komi› fyri, at Nor›ís hevur keypt og flutt hann aftur til Ei›is.

Tá nú landingarmi›stø›in vi› skiljilinju og tí, sum annars hoyrir til, ver›ur li›ug, fer at bera til at sleppa av vi› fiskin beinlei›is á Ei›i. Bátarnir fara tá at sleppa undan at gjalda fyri flutning. Og alt ger mun, sum Snopprikkur seg›i á sinni.

Bygningurin ver›ur gjørdur av bjálva›um elementum, sonevndum sandwich elementum, sum gjørd eru á elementvirkinum vi› Gjógv. Gólvi› ver›ur stoypt, og okkurt rúm ver›ur inni, sum innrættast skal, sigur bygdarrá›sforma›urin á Ei›i. Kostna›urin fyri sjálvan bygningin fer helst at liggja um eina hálva millión ella so.

Ta› er Ei›is Kommuna, sum byggir sjálvan bygningin. Men kommunan fer ikki at reka nakra landingarmi›stø›. Ætlandi ver›ur bygningurin leiga›ur út til onkra fyritøku, sum fer at reka virksemi› har. Og fleiri fyrispurningar eru, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi.

Av ø›rum sum gerast skal í ár, er at nevna, at vegir skulu asfalterast gjøgnum bygdina. Ta› arbei›i› er í gongd í løtuni.

Á havnarlagnum á Ei›i ver›ur grundin til n‡ggju landingarmi›stø›ina nú stoypt

Mynd: Edvard Joensen

Klaksvík fær eina n‡ggja sosiala deild

Fimm fólk koma at starvast á sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu, sum fer at virka um eina viku

SOSIALMÁL
Ey›un Klakstein

Klaksvík: Seinastu fyrireikingarnar ver›a nú gjørdar á n‡ggju sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu.

Tr‡ av verandi starvsfólkunum í b‡rá›sumsitingini og tvey n‡ggj starvsfólk skulu manna n‡ggju deildina, sum fer at taka sær av øllum sosialmálum í Klaksvík.

Lei›arin á deildini ver›ur Jancy Klein Biksopstø.

Í løtuni ver›a skrivstovuhølini, sum n‡ggja sosiala deild skal hava á ovastu hædd í b‡rá›shúsunum, gjørd klár, og ætlanin er, at deildin rættiliga skal koma at virka eina fer› í næstu viku.

Sosiala deild skal taka sær av umsitingini av sosialmálum í Klaksvík, og deildin skal eisini gera álit til sosialu nevnd hjá Klaksvíkar b‡rá›i.

Strí›i› um Brimil her›ist:

Hótta vi› verkfalli og endurgaldskravi

Vandi er nú fyri ósemjan um Brimil fer at føra vi› sær, at øll Vaktar- og Bjargingartænastan ver›ur løgd lamin av arbei›sste›gi. Hinvegin hevur Fíggjarmálast‡ri› hótt vi› endurgjaldskravi fyri at hava lagt arbei›i› ni›ur

-Ósemjan um hevur nú ført til, at Fíggarmálast‡ri› hevur ste›ga› lønini hjá yvirmonnunum og hevur samstundis hótt vi› endurgjaldskravi. Hinvegin hevur Skipara- og Navigatørfelagi› hótt vi› at seta tiltøk í verk.Og enn liggur liggur Brimil bundin vi› bryggju í Noregi

BRIMIL
Áki Bertholdsen

Enn røkist púra onki fyri, at n‡ggja Vaktar- og Bjargingarskipi›, Brimil, kemur til Føroya í bræ›i.

Tvørturímóti tykist ta›, sum um ósemjan ímillum manningarfeløgini og Fíggjarmálast‡ri› um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu manna Brimil, bara har›nar.

Og nú eru hóttanir um endurgjaldskrav sent av Fíggjarmálast‡rinum á Argjum tvørturum Havnarvág, yvir til Skipara- og Navigatørfelagi› Yviri vi› Strond. Men svari› frá Skipara- og Navigatørfelagnum var líka greitt. Felagi› sigur, at nú er máli› komi› hartil, at tat má umhugsa at seta tiltøk í verk, sum fara at raka alla Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Hótta vi› endurgjaldskravi

Ta›, sum serliga hevur fingi› partarnar at taka so álvarslig stig teir seinastu dagarnar er, at Fíggjarmálast‡ri› hevur ste›ga› lønini hjá yvirmonnunum á Brimli, bæ›i hjá skipara, st‡rimonnum og maskinmeistarum.

- Tá i› teir nokta at fara til arbei›is og ikki vilja gera ta› tænastu, sum ver›ur álagt teimum, so kunnu teir heldur ikki fáa løn, sigur Karsten Hansen.

Samstundis hevur Fíggjarmálast‡ri› bo›a› Skipara- og Navigatørfelagnum frá, at fyrivarni ver›ur tiki› fyri at krevja endurgjald frá teimum fyri at hava lagt arbei›i› ni›ur. Hetta hevur nú ført vi› sær, at yvirmenninir, sum skuldu mynstra vi› Brimli, og sum hava veri› í Noregi í eina tí› og gjørt klárt, eru nú á veg heimaftur vi› flogfari.

- Vit kenna ta› sum okkara skyldu at nokta limum okkara at sigla vi› Brimli, fyrrenn sáttmáli› er gjørdur. Tí sjólógin sigur, at skip kann ikki loysa, fyrrenn sáttmáli er gjørdur, sigur Ellintur Abrahamsen, forma›ur í Skipara- og Navigatørfelagnum. Hann leggur afturat, at ta› er rei›arin, sum skal syrgja fyri, at sáttmáli er.

Hann sigur, at ta›, sum fíggjarmálast‡ri› ger, er, at ta› roynir at tvinga yvirmenninar at sigla vi› ongum sáttmála, hóast ta› er at bróta landsins lógir. Men ta› mátti Fíggjarmálast‡ri› ikki vilja havt sitandi á sær, leggur hann afturat.

Hótta vi› arbei›sste›gi

Skipara- og Navigatørfelagi› hevur eisini tiki› ta› rættiliga illa upp, at fíggjarmálast‡ri› hevur ste›ga› lønini hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla vi› Brimli.

- Ta› hevur fíggjarmálast‡ri› ikki loyvi til, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann sigur, at menninir eru ikki settir í starv á ávísum skipi.

-Teir eru settir í starv hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og teir hava ikki s‡tt fyri at gera ta› arbei›i, teir eru vanir at gera.Ta› einasta, vit hava nokta› teimum at gera, er at bróta landins lógir, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann ger tí púra greitt, at ver›ur lønin hjá yvirmonnunum ste›ga›, er ta› sáttmálabrot. Og so fer Skipara- og Navigatørfelagi› at tilskila sær rætt til at seta tiltøk í verk.

- Tí hava vit bo›a› fíggjarmálast‡rinum frá, at talan kann blíva um samhugatiltøk, sum fara at raka alla Vaktar-og Bjargingartænastuna. Sostatt er vandi fyri, at ósemjan um Brimil nú fer at leggja alla Vaktar- og Bjargingartænastuna lamna, tí ta› ver›ur avlei›ingin, um limirnir í Skipara-og Navigatørfelagnum fara at leggja arbei›i› ni›ur. Eitt nú ver›ur avlei›ingin, at bæ›i Tjaldri› og Spógvin ver›a ver›ur lagdir.

1000

orsøkir at ferðast við MAERSK AIR

1000 kr. av vanliga APEX-prísinum

Frá 23. oktober til og við 10. desember 2000 ber til at ferðast bíliga til og úr Føroyum. Forsølan er frá 16. oktober til 3. desember 2000. Treytin er at tvey ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
ella
Danmark - Føroyar
og aftur 1)

Fyri hvønn
1500,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

Haldið jól í Danmark við MAERSK AIR

Frá 8. desember 2000 til og við 7. januar 2001 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Forsølan er frá 1. november til 11. desember 2000. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Føroyar - Danmark
(Keypmannahavn ella Billund)
og aftur 2)

Fyri hvønn
1250,-
+ ferðaavgjøld

Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%

2) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðin skal vara millum 7 og 21 dagar. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.

MAERSK AIR

petur og petur 320 870